

*Reykjavík við sínum ríka banka- og handilslívi*

síðani í Kaupthing, har hann skjótt varð fluttur fram í starvi. Saman við øðrum í leiðsluni legði hann í 1998 eina strategi, sum miðaði eftir, at Kaupthing skuldi økja sítt virksemi uttan fyri Ísland. Síðani hevur bankin yvirtikið ein hóp av fyritøkum í ymsum londum.

Tað nýggjasta er, at Kaupthing hevur yvirtikið danska vinnubankan FIH, ið er umleið líka stórur sum íslendski bankin sjálvur. Keypsprísurin var 7,2 mia.kr. Stutt eftir keypið læt FIH deildir upp í Malmø og Stockholm. FIH veitir ikki einstaklingum lán, men veitir miðallong lán til fyritøkur. Útlánini hjá FIH eru 55 mia.kr. Tey seinastu 5 árini hevur yvirskotið ligið millum 600 og 850 mió.kr. Bankin tekur ikki móti innlánum, men útvegar pening til útlánini við lánsbrøvum, sum verða seld íleggjarum.

Áðrenn Kaupthing seldi Føroya Sparikassa sín banka í Keypmannahavn, var nakað av virkseminum hjá hesum banka flutt yvir til FIH-bankan.

## Bankakeyp í Noregi

Kaupthing er størsti íslendski bankin, men eisini aðrir íslendskir bankar og fyritøkur gera vart við seg á marknaðinum í øðrum londum. Fyri kortum hava bæði Kaupthing og Íslandsbankin keypt norskar bankar. Hreidar Már Sigurðsson, stjóri í Kaupthing, sigur, at eftir trimum til fimm árum ætlar bankin at hava somu støðu í Noregi sum í Danmark og Svøríki. Hann sipaði til, at Kaupthing sum nevnt keypti FIH-bankan í Danmark fyri kortum og JP Nordiska í Svøríki fyri tveimum árum síðani. Málið er at gerast størsti íløgubanki í Norðurlondum. Í fjør keypti Kaupthing eina lítla norska meklarafyritøku, Sundvall, fyri at koma inn á norska marknaðin.

Hreidar Már Sigurðsson sigur við Aftenposten, at næstan dagliga ringja norðmenn til teirra og vilja hava teir at keypa okkurt - meklarafyritøkur, bankar og annað.

Íslandsbankin hevur keypt KredittBanken í Ålesund. Stjórin Bjarni Ármansson sigur, at Íslandsbankin miðar eftir at gerast størsti fiskivinnubanki í Norðurlondum. Íslandsbankin hevur fíggjað íslendska fiski- og sjóvinnu í 100 ár. Í summar stóð bankin á odda fyri einum syndikati við DnB NOR og Nordea, sum lænti Norway Seafood hjá Kjell Inge Røkke 300 mió.nkr.

Norska fiskivinnan hevur havt tað trupult tey seinastu árini, og tað hevur Kreditt-Banken eisini. Marknaðarvirðið hjá Íslandsbanka er umleið 12 mia.kr. Ognarvirðið er umleið 50 mia.kr, og 9 teir fyrstu mánaðirnar 2004 var yvirskotið 890 mió.kr.

## Baugur Group

Eitt annað íslendskt fíggjarfelag, sum er skrásett á virðisbrævamarknaðinum, kallast Baugur Group. Jón Asgeir Jóhannesson, stjóri, og skyldfólk hansara hava ræðið á fyritøkuni. Næststørsti partaeigari er Kaupthing. Yvirskotið hjá felagnum í fjør var umleið eina miljard. Eginognin er 3 mia.kr.

Baugur fíggjar fyrst og fremst tænastuvirksemi, smásølu og fastognir í Íslandi, Skandinavia og Bretlandi. Umsetningurin er 11 mia.kr., og meira enn 10.000 fólk arbeiða hjá Baugur.

Eitt yvirlit yvir nakrar av teimum stóru handlunum tvey tey seinastu árini sær soleiðis út:

Í mars 2003 keypti Baugur heimskendu ensku leikuketuna Hamley fyri 600 mió.kr.

Í oktober 2003 keypti felagið ensku mótaketuna Oasis fyri 1,6 mia.kr. Kaupthing eigur 12% av partapeninginum.

Í januar 2004 skipaði fíggjarstovnurin fjølmiðlafyritøkuna Norðlýsi. Hon gjørdist størsta fjølmiðlafyritøka í Íslandi við útvarps- og sjónvarpsstøðum og trimum dagbløðum.

Í mai 2004 keypti Baugur ensku gimsteinaketuna Goldsmith fyri 1,2 mia.kr.

Í sama mánaði seldi Baugur síni 21% av partapeninginum í Icelandair fyri 400 mió.kr.

Í juni varð enska mótaketan Karen Miller keypt fyri 1,3 mia.kr.

Í september bjóðaði Baugur umleið 1 mia.kr. fyri kvinnuklædnaketuna Hobbs, men Hobbs seldi øðrum keypara.

Í sama mánaði keypti dótturfelagið Norðlýsi 35% av fartelefonfelagnum Vodafone Og. 1. oktober keypti Baugur 10,5% av Vodafone Og.

Í oktober seldi Baugur 90% av Norðlýsinum til Vodafone Og fyri 350 mió.kr.

Í november varð so Magasin du Nord keypt fyri 500 mió.kr. og enska mótaketan Mk One fyri 600 mió.kr.

Í desember hevur Baugur bjóðað sær til at keypa restina av Big Food Group, har teir frammanundan eiga 22%. Tey 78% kosta 2,7 mia.kr. Í hesum mánaðinum hevur Baugur eisini bjóðað upp á skóketuna LK Bennett. Kostnaðurin verður væntandi 800 mió.kr.

## Ikki øll eru væl nøgd

Í Íslandi sum í Føroyum og øðrum smáum samfeløgum ganga somu nøvn mangan aftur. Eitt dømi er ein av nevndarlimunum í Kaupthing, Finnur Ingolfsson.

Hann var í mong ár altingsmaður fyri Framsóknarflokkin. Síðst í nítiárunum var hann vinnumálaráðharri og hevði tá arbeiðið við at liberalisera íslendska fíggjarheimin um hendi.

Í 1999 varð hann ein av trimum tjóðbankastjórum, sum skuldu syrgja fyri, at íslendski búskapurin ikki skuldi verða yvirupphitaður, og í 2001 tók hann við sum umsitingarstjóri í tryggingarfelagnum VIS.

Hann hevur verið virkin innan íslendsku samvinnurørsluna, og umboðandi hana er hann nevndarlimur í Kaupthing. Hann tekur tó ikki fult út undir við vakstrarstrategiini hjá bankanum. Tí seldi tryggingarfelagið VIS og lívstryggingin, sum hoyrir til, øll partabrøvini í Kaupthing í oktober í ár fyri 80 mió.kr.

Hann er ikki einsamallur um at vera ivasamur. Tað hevur eisini elvt til mikla ónøgd, at leiðslan í Kaupthing hevur vunnið nógvan pening persónliga gjøgnum banka- og annað virksemi hjá Kaupthing. Í oktober teknaði bankin nýggjan partapening, og tá tryggjaðu 14 leiðarar í bankanum sær sjálvum 250.000 nýggj partabrøv. Tilsamans eiga teir nú partabrøv fyri 750,3 mió.kr. (í okkara peningi) í bankanum.

Størsti innanhýsis eigari er sjálvur nevndarformaðurin, tann 44 ára gamli Sigurður Einarsson. Hansara partabrøv í Kaupthing eru 99,6 mió.kr. verd. Næststørsti innanhýsis eigari er umsitingarstjórin Hreidar Már Sigurðsson, sum er 34 ár. Hann eigur partabrøv fyri 79 mió.kr. Tann í leiðsluni, sum eigur minst, eigur partabrøv fyri 17,5 mió.kr.

Undir serligum umstøðum fekk leiðslan haraftrat forkeypsrætt at keypa 5 miljónir partabrøv aftrat, harav hevði nevndarformaðurin Sigurður Einarsson meira enn 4 miljónir av óbrúktum forkeypsrætti.

Í fjør hjálpti Sigurður Einarsson felagnum Baugur og eigaranum og stjóranum Jón Asgeir Jóhannesson út úr íslendska virðisbrævamarknaðinum í sambandi við eina kreppu. Baugur kom í trupulleikar eftir at hava gjørt íløgur í fleiri hundrað discounthandlar í USA. Aftaná yvirtók Kaupthing 19,8% av partabrøvunum í Baugur, men seldi herfyri 8,26% aftur.

Spekulasjónirnar hjá leiðsluni í Kaupthing fingu ilt í núverandi íslendska uttanríkisráðharran, fyrrverandi forsætisráðharran Dávið Oddson. Tað var í hansara stjórnartíð, at íslendska samfelagið var liberaliserað sum ongantíð, eisini fíggjarheimurin.

Við einum hópi av journalistum í hølunum fór hann til gongu úr Altinginum til eina bankadeild hjá Kaupthing og tók tær 400.000 krónurnar út, sum hann átti í bankanum, og setti tær í ein annan banka. Nøkur hundrað fólk gjørdu sum hann, men herferðin dovnaði, tá Kaupthing lovaði at taka skipanina við forkeypsrætti av.

## Fíggjareftirlitið stúrir

Nú hevur íslendska Fíggjareftirlitið eisini gjørt vart við sín ampa av virkseminum hjá íslendsku bankunum. Tað, sum serliga nervar Fíggjareftirlitið, er, at bankavirksemi og handilsvirksemi eru vavd so nógv saman. Felags ognarvirðurskifti millum bankarnar og tær fyritøkur, teir læna til, økja munandi um vandan fyri tapi, sigur Fíggjareftirlitið.

Í einari frágreiðing um íslendska fíggjarheimin skrivar Fíggjareftirlitið:

*"Tann spurningur hevur tikið seg upp, um ein bólkur av lántakarum er samanbundin á ein slíkan hátt, at gjaldsevni teirra kann metast sum ein einstakur váði. Í summum førum hevur Fíggjareftirlitið orsøk at halda, at slík sambond hava økt váðan út um loyvd mørk".*

Í Danmark verður víst á,

*Framhald á næstu síðu*